# Viðtøkur fyri Felagið Føroysk Ross

**Kapittul 1**
**Navn og heimstaður**

**§ 1.** Navn felagsins er: Felagið Føroysk Ross (“FFR”). Harumframt er hjánavn Felagsins: Føroysk Ross og altjóða undirheitið: Breeders of Faroese Ponies.
*Stk. 2.* Búmerki felagsins er:

Felagið Føroysk Ross

*Stk. 3.* Felagið verður stjórnað av eini nevnd við 3 limum, sum aðalfundurin velur.
*Stk. 4.* Heimstaður felagsins er búðstaðurin hjá formanninum.
*Stk. 5.* Felagið verður skrásett í Felagsskránni, sum Skráseting Føroya umsitur.

**Kapittul 2**
**Endamál felagsins**

**§ 2.** Endamál felagsins er at menna tann føroyska rossastovnin. At stuðla alingini av tí føroyska rossinum. Og at skapa áhuga manna millum fyri tí føroyska rossaslagnum.
*Stk. 2.* Endamálið verður framt við:

a) at røkja áhugamál felagsins mótvegis málførum myndugleikum, felagsskapum og øðrum.
b) at arbeiða fyri einum miðvísum aliarbeiði við føroyska rossaslagnum, herundir at føra ættarbøkur og fremja ítøkiligar verkætlanir.
c) at stuðla til djórasýningar, bæði almennar og hjá áhugabólkum.
d) at hjálpa til við keypi og sølu av lívdjórum.
e) at hjálpa til við og fáa í lag fundir, skeið, upplýsandi arbeiði v.m.
f) at veita limum felagsins ráðgeving og vegleiðing.

**Kapittul 3**
**Limaskapur**

**§ 3.** Einstaklingar, feløg og stovnar, ið viðurkenna endamál og lógir felagsins, kunnu gerast limir. Nýggir limir kunnu altíð takast upp. Limaskapurin hevur gildi, tá limagjaldið er goldið.
*Stk. 2.* Ein vanligur meiriluti í nevndini kann nokta einstaklingi, felagi ella stovni limaskap. Einstaklingurin, felagið ella stovnurin skal hava høvið at verja seg yvirfyri nevndini, áðrenn nevndin tekur avgerð um at nokta limaskap.
*Stk. 3.* Um einstaklingurin, felagið ella stovnurin krevur tað, kann avgerðin um noktan av limaskapi leggjast fyri fyrstkomandi aðalfundi. Áheitan um at leggja málið fyri aðalfundin skal gerast skrivliga til nevndina, í brævi ella við telduposti, í seinasta lagi 2 vikur eftir, at avgerðin er boðað til viðkomandi. Málið skal vera upplýst í skránni fyri aðalfundin. Aðalfundurin tekur avgerð við vanligum meiriluta. Einstaklingurin, felagið ella stovnurin skal hava høvið at verja seg á fyrstkomandi aðalfundi, áðrenn endaliga avgerðin um noktan av limaskapi verður tikin.
*Stk. 4.* Útmeldan skal gerast skrivliga til nevndina, í brævi ella við telduposti.
*Stk. 5.* Er eftirstøða fyri limagjald ikki goldin áðrenn aðalfund felagsins, fellur limaskapurin burtur.

**§ 4.** Felagið kann útnevna heiðurslimir, sum hava somu rættindi sum vanligu limir felagsins.
*Stk. 2.* Heiðurslimir verða útnevndir av aðalfundinum, eftir tilráðing nevndarinnar.
*Stk. 3.* Heiðurslimir fáa skreytskjal og rinda ikki limagjald.

**§ 5.** Nevndin kann fyribils útihýsa limi, um hesin í atburði ella gerð skaðar áhugamál felagsins. Avgerðin um fyribils útihýsan verður tikin við vanligum meiriluta í nevndini.
*Stk. 2.* Limurin, ið nevndin ynskir at fyribils útihýsa, skal hava høvið at verja seg yvirfyri nevndini, áðrenn nevndin tekur avgerð um at fyribils útihýsa limin.
*Stk. 3.* Mál um útihýsan verða endaliga avgreidd á fyrstkomandi aðalfundi. Mál um útihýsan skulu vera upplýst í skránni fyri aðalfundin. Aðalfundurin tekur avgerð við vanligum meiriluta.
*Stk. 4.* Limur, ið fyribils er útihýstur av nevndini, skal hava høvið at verja seg á fyrstkomandi aðalfundi, áðrenn endaliga avgerðin um útihýsan verður tikin.

## Kapittul 4
## Aðalfundur og nevndarval

**§ 6.** Aðalfundurin er hægsti myndugleiki í øllum viðurskiftum felagsins, og verður hildin í fyrsta ársfjórðingi.
*Stk. 2.* Fráboðan um aðalfund verður kunngjørd á heimasíðu felagsins og skrivliga til limir felagsins í seinasta lagi 2 vikur áðrenn aðalfundin.
*Stk. 3.* Innkomin mál skulu vera nevndini í hendi við árslok undan aðalfundinum.

**§ 7.** Skráin fyri aðalfundin skal altíð í minsta lagi verða henda:

1. Góðkenning av fundarboðunum og val av fundarstjóra og fundarskrivara.
2. Frágreiðing frá formanninum um virkið í farna ári.
3. Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi.
4. Val av formanni.
5. Val av tveimum nevndarlimum og tveimum tiltakslimum.
6. Val av grannskoðara.
7. Ásetan av limagjaldi.
8. Møgulig innkomin mál. Hesi eiga frammanundan at hava fingið nevndarviðgerð.
9. Ymiskt.

*Stk. 2.* Tey ár, har formaðurin ikki stendur fyri vali, fellur pkt. 4 burtur.
*Stk. 3.* Nevndin kann taka avgerð um at seta onnur mál á skránna. Hesi skulu verða tilskilað í aðalfundarfráboðanini.

**§ 8.** Limir, ið hava goldið limagjald eina viku áðrenn aðalfundin, hava atkvøðurætt á aðalfundinum.
*Stk. 2.* Atkvøðast kann við fulltrú, sum skal góðkennast av fundarstjóranum. Ein limur kann í mesta lagi atkvøða við fulltrú frá tveimum limum.
*Stk. 3.* Um nevndarlimur ella minst 5 limir krevja tað, skal atkvøðugreiðslan fara fram skrivliga.

**§ 9.** Valið til álitisstørvini fer soleiðis fram:

a) Formaðurin verður valdur fyri eitt tvey ára skeið.
b) Tveir nevndarlimir verða valdir. Fyrstvaldi og næstvaldi gerðast nevndarlimir, triðvaldi og fjórðvaldi gerðast tiltakslimir.
c) Ein grannskoðari verður valdur.

*Stk. 2.* Nevndin skipar seg sjálv við næstformanni og kassameistara.

*Stk. 3.* Limir felagsins, sum hava goldið limagjald eina viku frammanundan aðalfundinum, eru valbærir til álitisstørvini.

**§ 10**. Eykaaðalfundur verður hildin tá meirilutin í nevndini krevur tað, ella tá í minsta lagi 1/3 av limunum skrivliga krevja hetta.
*Stk. 2.* Fráboðan um eykaaðalfund verður kunngjørd á heimasíðu felagsins, ella skrivliga í seinasta lagi 10 dagar áðrenn aðalfundin.
*Stk. 3.* Um onki annað er tilskilað í fráboðanini um eykaaðalfund, verður skráin sbrt. § 7 í viðtøkum felagsins.

## Kapittul 5
## Gerðabók

**§ 11.** Nevndin hevur ábyrgdina av gerðabókini.
*Stk. 2.* Frásøgn frá tí, ið gjørdist á aðalfundi verður førd í gerðabók. Bókin verður undirskrivað av fundarstjóranum og nevdarlimunum. Nevndin kann taka støðu til at føra talgilda gerðabók.
*Stk. 3.* Allar avgerðir skulu førast í gerðabók felagsins.
*Stk. 4.* Í seinasta lagi 2 vikur eftir aðalfundin skal gerðabókin, ella eitt váttað úrrit av henni, vera atkomuligt hjá limunum.
*Stk. 5.* Nevndarfundir og samtyktir skulu somuleiðis førast í gerðabók og grundgevingar fyri samtyktini.

## Kapittul 6
## Roknskaparhald og tekningarreglur

**§ 12**. Nevndin hevur ábyrgdina av roknskapinum.
*Stk. 2.* Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

**§ 13.** Formaðurin og kassameistarin hava í felag rætt at binda felagið í fíggjarligum málum.
*Stk. 2.* Kassameistarin hevur ræðisrætt á konto felagsins, við ábyrgd mótvegis nevndini.
*Stk. 3.* Í málum um keyp, sølu, veðseting av fastari ogn, upptøku av lánum og málum um parta- ella ábyrgdarpening er felagið ikki bundið uttan, at hetta frammanundan er samtykt á aðalfundi.

## Kapittul 7
## Keyp og søla av rossum og gelding

**§ 14.** Eingin limur felagsins eigur at selja ross av føroyskum slagi, geldar hestar undantikið, til einstakling, felag ella stovn, ið ikki er limur felagsins, uttan at hann fyrst hevur boðað nevndini frá. Nevndini áliggur síðan innan eina viku at kunna limirnar um, at rossið er til sølu. Limir felagsins hava forkeypsrætt til ross av føroyskum slagi.
*Stk. 2.* Eingin ógeldur hestur má seljast øðrum enn limum felagsins.

**§ 15.** Áðrenn hestur verður geldur, skal hann vera sýnaður av fólki góðkendum av felagnum.
*Stk. 2.* Geldingin skal fara fram í samráð við nevndina.

## Kapittul 8
## Aling og djórasýningar

**§ 16.** Nevndin ráðgevur limum felagsins í alispurningum v.m. Tó kann nevndin lata hesar uppgávur røkja av øðrum limum felagsins, ella persóni við serkunnleika á økinum.

**§ 17.** Bert limum í felagnum er loyvt at føra fram ross av føroyskum slagi til kjósingar á sýningum, har Felagið Føroysk Ross er stigtakari, ella letur seg umboða.
*Stk. 2.* Nevndarlimir virka sum sýningsdómarar við djórasýningar, um annað ikki er avrátt av nevndini.

## Kapittul 9
## Avtøka av felagnum

**§ 18.** Avtøka av Felagnum Føroysk Ross kann bert fara fram um ein aðal- ella eykaaðalfundur, har ein meiriluti, ið minst telur 2/3 av limum felagsins, viðtekur hetta.
*Stk. 2.* Eftir aðal- ella eykaaðalfund sbrt. stk. 1, skal nýggjur aðal- ella eykaaðalfundur haldast 6 mánaðar seinni. Um tá avtøka av felagnum Felagið Føroysk Ross aftur verður viðtikin av minst 2/3 av limunum, er avtøkan endalig.

**§ 19.** Við avtøku verða ognir felagsins seldar hægstbjóðandi, og peningurin goldin Fornminnissavninum.

## Kapittul 10
## Gildiskoma

**§ 20.** Hesar viðtøkur koma í gildi dagin eftir at tær eru samtyktar á aðalfundi.
*Stk. 2.* Samstundis fara allar undanfarnar felagsviðtøkur úr gildi.